# Standa tættar í kreppu, men spjaddar við pengum

**- Tá ið kommunurnar vóru í kreppu og ongan pening høvdu at arbeiða við, stóðu tær ógvuliga tættar, men tá ið pengar aftur komu í kassan, fóru tær hvør í sínum lagi at gera íløgur. Bygdarráðsformaðurin í Hósvík, Jógvan Mørkøre, heldur ikki, at slíkt kemur at ganga í longdini – at hvør í sínum heraðshorni samtykkir og brúkar pening, og tá ið so neyðin er størst, aftur ganga saman. Í dag verður nýggj fólkaatkvøða í Hósvík um kommunu-samanlegging**

FÓLKAATKVØÐA
*Vilmund Jacobsen*



*Jógvan Mørkøre við valkassan seinast, tá ið hósvíkingar atkvøddu seg uttanfyri komandi Sunda kommunu. - Eg tori einki at siga ella vænta hesaferð, sigur bygdarráðsformaðurin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í dag verður aftur fólkaatkvøða í Hósvíkar kommunu um samanlegging við komandi Sunda kommunu. Hetta er onnur atkvøðugreiðslan um hetta mál í hesum árinum.

Við fyrru fólkaatkvøðuna hendi tað, at fólk í Hósvíkar kommunu, sum tey einastu í Norðstreymoy og í Sunda kommunu, atkvøddu seg uttanfyri ætlaðu samanleggingina.

Í øllum hinum kommununum var meiriluti fyri at leggja saman.

## Nýggj støða

Eftir fólkaatkvøðuna fóru fólk í Hósvík at savna inn undirskriftir til frama fyri samanlegging, og her vísti tað seg, at ein meiriluti av veljarunum kortini er fyri felagskommununi.

Í skrivi til bygdarráðið í Hósvík heittu tey á kommunustýrið um at skipa so fyri, at Hósvíkar kommuna eisini verður við í Sunda kommunu.

Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík, sigur, at við hesum undirskriftum fyrilá ein nýggj støða, og bygdarráðið kendi seg bundið at taka málið uppaftur.

- Tí verður ein nýggj fólkaatkvøða um spurningin aftur í dag, sigur hann.

Bygdarráðsformaðurin sigur, at atkvøðugreiðslan fer fram á sama hátt sum kommunuvalini, og tað er valnevndin í bygdini, sum tekur sær av øllum viðurskiftum í hesum sambandi.

Á atkvøðuseðlinum eru tveir møguleikar – ja ella nei fyri at leggja saman við komandi Sunda kommunu.

Estrid Olsen er formaður í valnevndini í Hósvíkar kommunu.

## Meira aggressiv

Vit spurdu Jógvan, um munur er á stemninginum hesaferð og undan seinastu fólkaatkvøðu.

- Eg vil siga bæði ja og nei. Tey fáu, sum vóru aktiv og góvu til kennar, at tey vóru ímóti seinast, eru meira aggressiv nú. Tað havi eg merkt. Men eg skilji ikki grundgevingarnar fyri, at hesi fólk siga nei at fara uppí Sunda kommunu.

Jógvan vísir á, at ein teirra, sum alment talar ímóti, sjálvur hevur sitið í bygdarráðnum í Hósvík.

- Eg skilji tað ikki, tá hesin í fyrstu atløgu talar fyri, at vit halda okkum burtur og síðan tosar um samstarv eftir, at vit ikki eru við í felagskommununi. Í mínari verð hongur hetta ikki saman, tí eru vit ikki innanfyri, so eru vit uttanfyri.

Bygdarráðsformaðurin vísir á samstarvið millum kommunurnar um ellis-og røktarheimið, sum byggjast skal í Hvalvík.

- Eftir seinastu fólkaatkvøðu hava vit undirskrivað ein sáttmála, har vit eru við til at bera okkara part av útreiðslunum, men bert kunnu fáa eygleiðarastøðu – og ikki atkvøðurætt – í nevndini.

## Eygleiðarastøða

Hann sigur, at Hósvíkar kommuna hevur bundið seg til at gjalda lánini aftur og møguliga at gjalda ein part av rakstrinum.

- Men sum eygleiðarar hava vit á pappírinum onga ávirkan á viðurskiftini annars.



*Hósvíkar søgdu nei til Sunda kommunu seinast. Hvussu valið fellir hesaferð, verður greitt í dag*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jógvan Mørkøre sigur seg ikki skilja, hvussu summi kunnu halda, at Hósvíkar kommuna fær líka nógv burtur úr við at samstarva sum aktivt at verða við í felagskommununi.

- Tey, sum sita við avgerðunum, kunnu jú altíð siga: Farið tit út og keypið, og tá ið keypt er, siga tey – gevið okkum peningin! Við eygleiðarastøðu, eru avgerðirnar ikki okkara. Tað verða hinir, sum seta dagsskránna, sigur hann.

Bygdarráðsformaðurin sigur seg undrast yvir, at hesin fyrrverandi bygdarráðslimurin, sum er skrivari hjá Norðstreymoyar Sambandsfelag, er so hart ímóti hesi samanlegging.

- Eingin hevur verið meira aktivur fyri samanlegging av kommunum sum táverandi landsstýrismaður Sambandsfloksins, Eilif Samuelsen. So, eg skilji ikki rættiliga, hvussu hetta hongur saman, og hvørjar grundgevingarnar eru fyri, at Hósvíkar kommuna – sum ein lutfalsliga lítil kommuna - í framtíðini skal liggja einsamøll ímillum tvær stórar kommunur.

## Saman og sundur

Jógvan Mørkøre sigur, at orsøkin til, at hann hálsaði um, sum hann sjálvur tekur til, er, at hann seinastu árini hevur sæð, hvussu gongdin hevur verið.

- Tá ið kommunurnar vóru í kreppu og ongan pening høvdu at arbeiða við, stóðu tær ógvuliga tættar, men tá ið pengar aftur komu í kassan, fóru tær hvør í sínum lagi at gera íløgur.

Bygdarráðsformaðurin heldur ikki, at slíkt kemur at ganga í longdini – at hvør í sínum heraðshorni samtykkir og brúkar pening, og tá ið so neyðin er størst, aftur ganga saman.

- Eitt av málunum við samanlegging er at fyribyrgja, at vit ikki fáa fleiri dupult-funktiónir kring um í kommununum. Hesum er eingin meining í, um tær ikki eru neyðugar.

Hann vísir á, at tað tekur bert einar 20 minuttir at koyra úr Hósvík og norður til Eiðis.

## Ivingarsamur

Vit spurdu eisini Jógvan, hvat hann væntar, at útfallið av fólkaatkvøðuni verður í dag.

- Eg tori einki at siga ella vænta. Men tað verður undarligt, um meirilutin av veljarunum, sum heitti á bygdarráðið um at taka málið uppaftur, ikki fer á val. Um so verður, at meiriluti enn einaferð verður fyri ikki at leggja saman, fari eg at seta eitt stórt spurnartekin við, hvat undirskriftir eru verdar – og hvat demokratiið er vert.

Men hvat gert tú, um samanleggingin ikki vinnur frama?

- Eg geri einki, men tá verður málið í hvussu er ikki tikið uppaftur í hesum valskeiðnum.

Jógvan heldur tó ikki, at hann fer at leggja frá sær sum bygdarráðsformaður – uttan mun til, hvat úrslitið verður í dag.

- Eg kenni á mær, at ein stórur partur av bygdarfólkinum stuðlar mær, og eg kenni tað sum mína skyldu at sita restina av hesum valskeiðnum, soleiðis at vit undir øllum umstøðum fáa framt tey mál, sum liggja fyri framman.

Í hesum sambandi nevnir Jógvan eitt nú stovnin fyri børn, vatnið í kommununi og aðrar útbyggingar, sum kommunan hevur ætlanir um at fremja í hesum valskeiðnum.

## Alt at vinna

- Eg taki hetta púrasta avslappað, men mæli bygdarfólkinum staðiliga til at velja samanleggingina – og ikki at seta seg uttanfyri eina komandi Sunda kommunu og teir møguleikar, sum her eru at vinna, sigur Jógvan Mørkøre.



Hotellstjóri í Blokkhus:

# Føroyingurin er so positivur



*Bartholin Thomsen eitur nýggi stjórin á Cafeteria í Vandland. Hann hevur bert starvast í ein mánaða so ikki allir føroyingar sum vitjaðu Danlanmd í Blokhus hava hitt Bartholin. Men hann hevur verið í Føroyum og starvaðist í Mjørkadali eitt ár, hetta var í 1969. Og í frítíðini arbeiddi hann eisini — ikki dønum ólíkt — í Føroya Keypsamtøku í Havn*

**- Føroyingurin er róligur og skal hava góða viðgerð og vit hava tær bestu íbúðirnar til føroyingar, sigur Frank Pedersen, hotelstjóri á Nordsøen í Blokhus**

FRÍTÍÐ
*Orð&myndir: Ólavur í Beiti*




*Soleiðis sær Danland út í Blokhus.*

Danland í Blokhus: Hotelstjórin á Danland hotellinum í Blokhus, Frank Pedersen, kennir fleiri føroyingar og og óivað kenni fleiri túsund føroyingar henda blíðsníðaða og fryntliga man. Av teimum lovorðum Frank Pedersen hevur um føroyingar, ja so kundi eg sagt tað sama um mannin sjálvan, tí soleiðis havi eg eisini lært hann at kenna, at hann er ein sera fyrikomandi og smílandi og vinarligur maður.

Frank Pedersen er 62 ára gamal og hevur starvast innan hetta øki í 30 ár, so hann kennir sítt fak, sum vit siga. Og nú er dóttir hansara Inge eisini komin meiri og meiri við, sum eg skilji, og verður helst at taka yvir eftir pápan, tá ið hann einaferð leggur frá sær. Frank Pedersen er útbúgvin virkisleiðari og áðrenn hann tók yvir hotellið var hann leiðari í 10 ár í eini keypsamtøku.

## 276 íbúðir

Nordsøen hotellið í Blokhus er eitt av teim størstu hotellunum hjá Danland. Tað hevur 276 íbúðir í 3 støddum. Í sjálvari móttøkuni starvast 5 fólk, men so eru alt í alt eini 50 fólk knýtt at virkseminum á hotellinum — hjálparfólk av ymiskum slagi, reingerðingsfólk, 1 málari og ein timburmaður, 15 fólk á kafeteria í Vandland osv. Og tað skulu eisini nógv fólk at halda hesum stóra øki við líka og í brúkligum standi, tað sigur seg sjálvt.

Tá ið eg skal hitta Frank verði eg boðin inn á skrivstovu hansara, men hann er skjótur at siga mær at á hesi skrivstovu er hann nærum ongantíð. Honum dámar best at sita úti í móttøkuni. Men hann skal vísa mær eina tekning av tí nýggja motiónsrúminum sum skal gerast. Hetta er eitt 200 fermetrar stórt motiónsrúm sum verður klárt at taka í nýtslu í apríl-mai komandi ár. Umframt at íðka motión er í hesum nýggja øki eisini sauna og felags-sauna, dampbað, vatnmassaga og luftmassaga, Jet-stream, Relax Bassin og solariir og húðrøkt.



*Frank Pedersen og dóttirin Inge. Tey gleða seg bæði at síggja føroyingar aftur komandi summar.*

## Tær bestu íbúðirnar

Eg eri forvitin at vita, hvussu Frank Pedersen dámar føroyingar og eitt stórt og vinarlig smíl legst um alt andlit hansara og so koma lovorðini út í stríðum streymi.

- Føroyingurin er róligur og skal hava eina góða viðger og eg havi bara havt góðar upplivingar saman við føroyingum, sigur Frank, og eg vóni at vit fáa sama tilboðið aftur komandi ár, leggur hann so aftrat, og her hugsar hann sjálvandi um góða tilboðið sum einir 6000 føroyingar hava keypt í summar til Danland.

- Og vit hava eisini havt eitt sera gott samstarv við Smyril Line, sigur Frank Pedersen og vil vita, um eg kenni tann og tann á Smyril Line, sum eg so geri.

- Føroyingar fáa eisini tær bestu íbúðirnar, sigur Frank Pedersen, men hann er ikki vísur í, um eg skal skriva tað, og gevur mær so loyvi til tað kortini, tá eg sigi honum at Føroyar er eitt sera lítið land og alt frættist við miklari ferð, sum hann sjálvandi veit.

- Men okkara primera aktiv er strondin, endar Frank Pedersen við at siga og nú hevur hann boðið morgunmat og eg heilsi uppá nøkur av starvsfólkunum í móttøkuni, eisini Inge, dóttrina, sum hevur eyðkenda smílið eftir pápan.